ítróttur

Nr. 2 • hósdagur • 4. januar 2001 • 75. árgangur • www.sosialurin.fo

Fara at tveita sleggjur og spjót

Mikudagin 8. august verður FM í klingruvarpi, sleggjuvarpi og spjótkasti á kastibreytini við Eysturskúlan í Havn.

Lagt verður fyri við klingruvarpi kl. 18.00, og tá hendan kappingin er liðug verður hildið fram við sleggjuvarpi, og seinasta kappingin verður spjótkast.

Tey, sum ætla sær við til kappingina, kunnu tekna seg til á staðnum kl. 17.30 mikukvøldið.

Heri Ziska, sum hevur verið einaráðandi á klingru- og sleggjuøkinum, verður ikki við í kappingini, so nýggjur føroyameistari skal finnast.

ek

Heidi setti heimsmet

Bæði Heidi og Esther fingu heiðursmerki í 200 metra blandaðu svimjingini hósdagin

SVIMJING
Eyðun Klakstein

Heidi Andreasen setti nýtt heimsmet, tá hon svam 200 metra blandaða svimjing í EM fyri rørslutarnað, sum er í Stockholm. Heidi svam teinin í tíðini 3.02,11, og hetta var nakað betri enn gamla metið, sum var 3.02,94.

Tann, sum átti metið í hesi kappingini, var Dora Paztory úr Ungarn, og hon gjørdist nummar 2 í kappingini hósdagin.

Esther Gaard Hansen var eisini við í kappingini, og hon gjørdist nummar 3 við tíðini 3.12,31.

Føroyska ferðalagið var sera væl nøgt við úrslitið í hesi kappingini, og venjarin, Katrin Johansen, helt tað vera framúr úrslit, at báðir føroysku svimjararnir skuldu heiðursmerki.

Hetta er næsta gullmerkið hjá Heidi Andreasen, meðan Esther Gaard Hansen hevur vunnið eina bronsu frammanundan.

Í gjár vóru aftur kappingar á skránni í Stockholm.

Føroyska ferðalagið verður aftur í Føroyum mánadagin.

Heidi Andreasen við gullmerkinum og Esther Gaard Hansen við bronsuni. Heidi setti nýtt heimsmet í 200 metrar blandaðari svimjing fyri rørslutarnað

Klassikari í eyðmjúkari útgávu

HB og KÍ stríðast bæði fyri atgongumerkjum til europeiskan fótbólt

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað var tann tíð, tá dystirnir ímillum HB og KÍ skuggaðu yvir allan annan fótbólt – hvørja ferð. Tey seinnu árini hevur tað verið eitt sindur upp og niður. B36, VB, B71, GÍ og B68 hava ofta havt hug at spæla fyrstu violin, og árið í ár er einki undantak í so máta.

Bæði HB og KÍ mugu sigast at vera í tungum sjógvi. HB var væl upplagt tíðliga í ár, og KÍ hevur – eftir at teir hava mist nógv fólk – ikki staðið seg væl. Málmunurin hjá KÍ er 10–25, og tað er óhoyrt. Vónin fyri europeiskum fótbólti hjá KÍ var steypafinalan, men hana taptu teir.

Tí eru bæði HB og KÍ rættað ímóti triðja plássinum, sum fer at bera UEFA Cup pláss við sær (B36 hevur sum steypavinnari longu vunnið sær pláss í UEFA Cup).

Runnið sólina svarta

Tá HB ólavsøkuaftan spældi ímóti Hvidovre, tóktust teir svørtu og reyðu ógvuliga tungir. Teir siga sjálvir frágreiðingina vera, at teir hava runnið og runnið, sum teir ikki hava gjørt, síðani teir í 1998 vunnu FM heitið.

– Tann lagaligi Ion Geolgau, sum vit hava havt við at gera hetta seinasta árið, er skiftur út aftur við tann harða og krevjandi venjaran, sum pískaði okkum til FM heitið í 1998, siga teir í HB, og sipa sjálvandi til søguliga Ivan tann Ræðuliga.

Andrew av Fltøum og Hans á Lag hava spælt millum lítið og einki í ár. Nú er greitt, at teir skulu báðir leggjast undir skurð fyri fótskaða, áðrenn teir kunnu spæla bólt aftur, og tað vil siga, at teir vera lítið og kanska einki við í ár. Rókur av Fløtum Jespersen er í Danmark við U–17 landsliðnum, so hann verður ikki við. Annars eru hinir spælararnir tøkir í dystinum, tá Allan Mørkøre ímóti barndómsfelagnum fær fyrsta høvið at vísa, at Allan Simonsen gjørdi eitt mistak, tá hann í vikuni vrakaði metmannin á landsliðnum.

Mannfall

KÍ hevur mist nógv fólk, og nú verður mannfallið uppaftur størri. Símun Joensen og Niclas Niclassen fara báðir av landinum. Málverjin, Meinhardt Joensen, er farin til Danmarkar at ganga í tekniskan skúla, men hann kemur heim at spæla í morgin.

Harley Bertholdsen plágast framvegis av skaðanum og verður neyvan klárur, og so er tað ivasamt, um Ove Nysted verður tøkur. Allan Joensen noyddist at taka seg aftur lítla løtu undan steypafinaluni. Hann hevur ikki vant í vikuni, og teir ivast í, nær hann verður førur fyri at spæla aftur.

Málturkurin er stórur

NSÍ og FS Vágar skulu í klára seg uttan vandamiklastu spælararnar

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Í fleiri av dystunum í morgin er lagt upp til, at tað verður tætt og spennandi. Tað verður tættuliga spennandi, tá Albert Ellefsen og Jonhard Joensen við sínum monnum í morgin koma úr Vágum og til Runavíkar, men tað er fullkomuliga ógjørligt at siga, hvussu tað fer at ganga. NSÍ hevur verið sera óstøðugt, og FS Vágar stóð seg illa, inntil teir í síðsta umfarinum undan summarsteðginum gjørdu bart og vunnu á meistarunum úr Vági.

Felags fyri bæði liðini er, at tey eru málfátøk. NSÍ hevur skorað níggju mál í tíggju dystum, og FS Vágar hevur skorað tíggju ferðir.

Hóttanir burtur

Christian Høgni Jacobsen var – hóast hann higartil í landskappingini bara hevur skorað eitt mál – mettur sum størsta álopshóttanin hjá NSÍ. Nú er hann burtur, og um hann hevði verið heima, so hevði hann verið leikbannaður. Sambært útøkulistan til landsdystin í Jugoslavia, so er Christian Høgni framvegis skrásettur sum NSÍ spælari. Tað vil siga, at hann verður ikki leikbannaður í fyrsta dystinum, tá hann eina ferð kemur aftur til Føroya.

Umframt Christian Høgna má NSÍ framvegis klára seg uttan Kára Hansen, sum hevur ilt við at koma fyri seg eftir skaða. Sjúrður Jacobsen hevur, sjálvt um hann er plágaður av skaða, roynt at venja, og hann verður ivaleyst við í morgin.

Í Vágum hava teir gjørt nógv við venjingina í summar. Spælararnir eru betri fyri nú, enn teir hava verið, og so fer tað at vísa seg, um teir fara at megna at lyfta seg úr botnplássinum.

Tór–Ingar Akselsen er ein av vandamiklu FSV monnunum. Í vikuni er hann farin av landinum, og hann verður ikki við í morgin og annan leygardag, tá FSV á heimavølli skal spæla ímóti B71. Annars eru allir spælararnir hjá FSV tøkir.

Popczynski framvegis ivasamur

B68 skal klára seg uttan liðformannin higartil í ár

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Tað eru tvey av liðunum, sum hava eyguni vend ímóti triðja plássinum og harvið møguleikanum fyri altjóða fótbólti komandi ár, sum hittast á Vágs eiði í morgin.

VB spælararnir hildu frí í vikuni eftir, at teir komu aftur úr Hvítarusslandi. Tað vil siga, at teir hava bara vant síðani mánadagin í hesi vikuni:

– Eg eri ikki serliga fegin um, at vit hava vant so stutt, men tað kundi ikki vera øðrvísi. Tað var neyðugt, at spælararnir fingu frí í nakrar dagar, eftir at teir høvdu vant nógv upp undir Europa Cup og eftir at teir høvdu ferðast langt.

Tað sigur VB venjarin, Kryztoph Popczynski. Hann hevur verið skaddur stóran part av árinum. Hann hevur roynt at venja í hesi vikuni, men hann heldur tað vera ógvuliga ivasamt, um hann verður á vøllinum í morgin. Umframt venjaran manglar ein annar maður í VB leguni. Tað er Marner Richardt, sum er leikbannaður, tí hann hevur ov nógv gul kort á kontoini.

Allir tøkir

Toftamenn vilja fegnir út í Europa komandi ár. Tí hevur dysturin ímóti VB, sum bara er eitt stig aftanfyri teir, alstóran týdning.

Síðani landskappingin fór í summarfrí er liðformaðurin hjá B68 og ein av týdningarmiklastu spælarunum bæði í ár og nógv av undanfarnu árunum stungin av. Øssur Hansen er farin til Keypmannahavnar, har hann skal royna seg í B93.

Tað vil við øðrum orðum siga, at uppaftur størri byrðar enn undan summarsteðginum verða lagdar á Fróða Benjaminsen og á U–19 landsliðsmannin, Jann Inga Petersen, sum stóð seg so væl í síðstu umførunum undan summarsteðginum.

Av Toftum frætta vit, at allir spælararnir eru tøkir. Eisini Jan C. Dam, sum var nógv skaddur undan summarfrítíðini.

Dystir og dómarar

1. deild – sunnudagin
EB/Streymur–GÍ: Petur Erhard Kjærbo
HB–KÍ: Suni Johansen
VB–B68: Lassin Isaksen
NSÍ–FS Vágar: Niklas á Líðarenda
B71–B36: Oddmar Andreasen

2. deild – leygardagin
TB–Skáli: Petur Erhard Kjærbo
HB–NSÍ: Rúni Gaardbo
LÍF–ÍF: Tummas Pauli Olsen
Sumba–GÍ: Dagfinn Olsen
KÍ–B36: Petur Reinert

3. deild – sunnudagin
TB–GÍ: Poul Erik Jacobsen
AB–KÍ: Johann Krog
VB–B68: Tummas Pauli Olsen
Royn–ÍF: Zoran Mancic
B71–B36: Erling Eysturoy

Kvinnur – sunnudagin
VB–B68: Georg N. Rasmussen
KÍ–B71: Óli Samuelsen
B36–HB: Jógvan A. Jacobsen

Støðan 1. deild menn:

GÍ	10	10	0	0	38–9	30
B36	10	8	1	1	35–7	25
HB	10	5	1	4	20–12	16
B68	10	5	1	4	21–17	16
VB	10	5	0	5	26–14	15
KÍ	10	4	0	6	10–25	12
NSÍ	10	3	2	5	9–14	11
EB/S	10	3	0	7	10–17	9
B71	10	2	1	7	8–24	7
FS V	10	2	0	8	10–48	6